ISBN 99918-60-04-5

# Bygdin – fyrr, nú og í framtíðini

Bergmann Finnsson[1] og Sámal Matras Kristiansen[2]

*Granskingardepilin fyri Økismenning*
www.region.fo

**NÁMSRIT 7/2006**

*Um námsrit:*
**Námrit eru rit, ið kunnu nýtast sum undirvísingartilfar í føroyska skúlaverkinum, eitt nú í miðnáms- og handilsskúlum. Námsrit eru frágreiðandi lýsingar av samfelagsligum evnum og vera altíð skrivaði á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnaði til útgávu í Námsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

[1] Bergmann Finnsson er Cand. Scient. Soc. í geografi og søgu
[2] Sámal Matras Kristiansen er Cand. Scient. Soc. í samfelagsfrøði og geografi

## Innihaldsyvirlit

Inngangur ........ 3
Siðbundna bóndabygdin ........ 5
Tann modernaða fiskivinnubygdin ........ 11
Úr bygd í bý – býargerðing av samfelagnum ........ 17
Hvat er ein bygd í 2006? ........ 19
Mótbýargerðin – mótvegis eini postmodernaðari bygd? ........ 21
Bygdin og framtíðin ........ 26
Bókmentalisti ........ 30

# Inngangur

Føroyska bygdin hevur verið fyri einari støðugari menning tey seinastu 200 árini. Menningin hevur havt við sær, at tað gamla bóndasamfelagið, við sínum feudalu normum, í størri og størri mun er vorðið avloyst av einum modernaðum, kapitalistiskum fiskivinnusamfelagi. Hesi seinastu árini er bygdin harumframt vorðin alsamt meiri merkt av altjóðagerðini, og heilt nýggjar vinnur og mentanir eru farnar at stinga seg fram. Vit báðir, Bergmann Finnsson og Sámal Matras Kristiansen, hava skrivað høvuðsritgerð um føroyskar bygdir og hildu tískil, at tað var upplagt at skriva eitt námsrit um hetta spennandi evni. Í høvuðsheitum hevur Bergmann skrivað um fortíðina, meðan Sámal hevur skrivað um nútíðina og eitt sindur um framtíðina hjá bygdunum.

Hetta er sum vera man eitt grunt rit, ið ikki fer niður í smálutir í heilum. Um lærarar, næmingar ella onnur áhugaði vilja vita nærri um eitthvørt í hesum riti, ið tað kanska verður farið heldur lættliga um, so skulu viðkomandi vera vælkomin at seta seg í samband við antin Bergmann ella Sámal. Vit eru eisini til reiðar at halda fyrilestrar um ymisk evni í hesum sambandi.

Í ritinum vera tríggjar søguligar føroyskar bygdatýpur nýttar til at lýsa menningina í tí føroysku bygdini í tíðarskeiðinum ár 1800 og fram til í dag. Hesar bygdatýpur eru bundnar at ymsum samfelagsformum og søguligum tíðarskeiðum í tí føroyska samfelagnum:

1) *siðbundna (traditionella) bóndabygdin* (uml. 1800-1890), bundin at tí gamla feudala bóndasamfelagnum,
2) *modernaða fiskivinnubygdin* (uml.1890-1990), bundin at tí kapitalistiska fiskivinnusamfelagnum og
3) *post-modernaða bygdin* (uml. 1990 og fram) har økis- og altjóðagerðin í dag í størri og størri mun merkja livikorini í bygdini.

Tó eru eyðkenni frá øllum trimum bygdatýpunum at finna í øllum teimum føroysku bygdunum í dag. Bóndabygdin livdi víðari og varð ein partur av tí modernaðu fiskivinnubygdini, eins og eyðkenni hjá hesum báðum gomlu bygdatýpum, tó kanska serliga fiskivinnubygdini, kunnu finnast aftur í tí post-modernaðu bygdini. Tað, vit tala

um í dag, er tískil eitt søguligt produkt av einari støðugari menning av bygdini, ið er farin fram tey seinasta nógvu ættarliðini. Tað, ið vit mugu gera okkum greitt, er, at talan ongantíð hevur verið um fullkomiliga stakar fasur í menningini av bygdini, og tí skulu tær tríggjar bygdatýpurnar, ið lýstar verða, heldur síggjast sum ein roynd at lýsa nakrar av teimum grundleggjandi eginleikunum við ávikavist bóndabygdini, fiskivinnubygdini og tí post-modernaðu bygdini.

Landafrøðiliga hevur eisini verið munur á menningini í teimum føroysku bygdunum tey síðstu 200 árini. Nakrar bygdir hava lítlan og ongan vøkstur havt, aðrar hava havt vøkstur í onkrum tíðarskeiðum og eru vaksnar til stórpláss og eru síðani stagneraðar, meðan aftur aðrar seinni í tíðarskeiðinum eru byrjaðar at vaksa og enn eru í vøkstri í dag. Í hesum ritinum fara vit eisini at nema við ta søguligu- og samfelagsligu menning, sum hevur havt ávirkan á hendan ójavnt býtta vøksturin í føroysku bygdunum.

Bygdin hevur eina fortíð, eina nútíð, men eisini eina framtíð. Vit royna at hyggja eitt sindur longur fram enn til nútíðina og gera okkum nakrar tankar um, hvat vit kunnu vænta okkum av bygdunum í framtíðini. Ein týðandi lærdómur er, at bygdin ongantíð stendur í stað, sum summi kanska hava lyndi at ímynda sær, men at bygdin er í støðugari broyting. Við at lýsa broytingarnar í bygdunum hesi seinastu 200 árini fáa vit eisini eina fatan av, hvussu nógv bygdirnar helst eisini fara at broytast í framtíðini. Summar bygdir fara at hava stóran fólkavøkstur, meðan aðrar – tað slepst helst ikki undan – fara at doyggja út, í minsta lagi sum livandi lokalsamfeløg. Og samstundis spretta eisini nýggjar bygdir burtur úr ongum, har eingin hevði væntað, at fólk fóru at byggja.

## Siðbundna bóndabygdin

Um ár 1800 vóru bygdirnar í Føroyum flest allar markatalsbygdir, t.v.s. bygdir, ið høvdu eitt ávíst øki av jørð (markatal), sum hoyrdi til bygdina. Hendan skipanin við markatalsbygdum í Føroyum stavar frá tíðini aftan á landnámið (uml. ár 825), har teir fyrstu stóru landnámsgarðarnir við tíðini, og sum fólkatalið vaks í oyggjunum, blivu býttir sundur í minni og minni garðar, har fólk settu seg niður (Brandt 1983a og b). Í miðøldini vóru markatalsbygdirnar, sum vit kenna tær í dag, longu grundaðar, og fram til uml. ár 1850 vóru hesar bygdir og framleiðslan, sum knýtt var at teimum, grundarsteinurin undir føroyska samfelagnum.

Í tíðini eftir landnámið var øll jørðin í Føroyum á privatum hondum, men gjøgnum miðøldina fekk kirkjan, sum var ein týðandi partur av miðaldarsamfelagnum, ognað sær ein part av jørðini. Við siðaskiftið í 1540 fór kirkjujørðin undir kong og gjørdist tað, vit í dag kenna sum kongsjørð, meðan tann privata jørðin varð verandi á privatum hondum og nevndist óðalsjørð. Kongur hevði (eins og landið hevur í dag) sínar festarar, kongsbøndur, prestar og embætismenn á gørðunum í teimum ymisku bygdunum kring landið, meðan óðalsjørðin um ár 1800 var smátt býtt ímillum nógvar smáar eigarar.



*(Kortið er úr Finnsson 2005 Kelda: Matrikulstovan)*

# Markatalsbygdirnar

Markatal er gamalt virðismát og var markatalið treytað av, hvussu nógv í virði (mátað í mørk, gyllin og skinn) jørðin í bygdunum kundi geva av sær.

Markatalsbygdirnar í Føroyum eru 84 í tali og tað er ógvuliga ymiskt hvussu stórt markatalið er í bygdunum. Miðal markatalið fyri tær føroysku bygdirnar liggur umleið 25 merkur. Størsta markatalsbygdin er Hvalba (98 merkur og 13 gyllin) og tær minstu eru Norðtoftir og Norðskáli (hvør sínar 4 merkur).

Eisini er ymiskt, hvussu býtið er millum kongs- og óðalsjørð í bygdunum. Onkrar eru reinar óðalsbygdir (t.d. Gjógv í Eysturoy) meðan aðrar hava størsta partin í kongsjørð.

Kongsbygdirnar eru serliga miðsavnaðar í syðra parti av Streymoy, í landsynningspartinum av Eysturoy og partvíst í Norðuroyggjum, meðan óðalsbygdirnar serliga eru í Norðuroyggjum, í norðaru Eysturoy, í Vágunum, í Sandoy og í Suðuroy. Kongsjørðin hevur serliga verið knýtt at embætisgørðum (serliga kring Havnina) og prestagørðum (t.d. próvstagarðurin á Nesi í Eysturoy og prestagarðarnir í Ónagerði á Viðareiði og í Leirum í Hvalba), men ein stórur partur av kongsjørðini hevur eisini verið umsitin av kongsbóndum á størri kongsgørðum kring landið.

Tá kongsbóndin legði frá sær ella doyði, var lógin so, at tann elsti sonurin arvaði allan garðin, meðan óðalsjørðin í flestu førum varð býtt ímillum børnini hjá óðalsbóndanum, og harafturat kundi óðalsjørðin seljast og keypast, nakað sum ikki var møguligt við kongsjørðini. Hetta hevði við sær um ár 1800, at óðalsjørðin í mongum førum var býtt í ógvuliga smáar partar, meðan kongsjørðin var savnað í størri gørðum.

Í markatalsbygdunum var framleiðslan grundað á landbúnað, seyðahald og útróður. Jørðin var grundarlagið undir einum stórum parti av framleiðsluni í gamla bóndasamfelagnum, og harvið var jørðin eisini eitt valdsamboð hjá teimum, sum áttu ella umsótu jørðina. Serliga í bygdunum, sum høvdu jørðina í kongsjørð, sótu kongsbøndur á tilfeinginum í bygdini. Ymiskir fyrimunir vóru knýttir at jørðini, sum bøndurnir høvdu fram um hitt vanliga fólkið, fyrimunir sum seyður, korn, eplir, torv, rekaviður ella jarðarhvalur. Tað vanliga fólkið, ella tey jarðarleysu, sum onga jørð áttu, høvdu tí í mongum førum einki annað val í lívinum enn at arbeiða fyri bóndan sum tænastufólk ella, í øðrum førum, sum uppsitarar á embætis- ella prestagørðum.

Í 18. øld var framleiðslan á gørðunum í Føroyum landbúnaðar- og kjøtframleiðsla til egna nýtslu, umframt ull- og bundnavørur til útflutnings. Í seinnu helvt av 18. øld gjørdust bundnar hosur til útflutnings ein týdningarmikil vinnugrein. Hetta kravdi nógv tænastufólk á gørðunum at arbeiða ullina og at binda hosurnar. Hetta sæst eisini av, at tað í 1777 varð bannað fólki, sum ikki áttu eitt ávíst virði í jørð ella á annan hátt kundu vísa á, at tey kundu forsyrgja seg sjálvi, at gifta seg og seta búgv (Joensen 1987, 30f). Bøndurnir høvdu tørv á teimum, sum ikki áttu jørð, at arbeiða á gørðunum, og vóru ikki áhugaðir í, at fólk sjálvi settu seg niður og fóru at virka ull og hosur. Forboðið móti, at jarðarleys sluppu at gifta seg, varð ikki avtikið fyrr enn í 1846 (Madsen 1990, 105).

Útróðurin í teimum føroysku bygdunum hevði frá gamlari tíð verið í felag, og vanligt var, at bøndurnir høvdu ein størri bát, vanliga eitt áttamannafar, sum menninir í bygdini mannaðu. Í seinnu helvt av 18. øld og í byrjanini av 19. øld gjørdist tað tó alt meira vanligt, at vanligir menn fingu egnan bát. Hetta førdi við sær, at bøndurnir høvdu verri við at manna sínar bátar, og førdi hetta við sær í 1813, at tað varð lógarfest, at bóndans bátur skuldi mannast áðrenn hinir bátarnir í bygdini. Hetta var tað sokallaða *”bátsbandið”*, sum var í gildi fram til 1865. Tó var tað ógvuliga ymiskt, hvussu hetta varð handfarið í teimum ymisku bygdunum. Í onkrum bygdum varð tað handfarið strangliga, meðan tað aðrastaðni var at kalla ókent (Joensen 1987, 37f).

Fólkatalið í Føroyum og í teimum føroysku bygdunum hevur ligið nøkulunda støðugt um 4-5.000 fólk frá umleið ár 1600-1800 (Guttesen 1969). Framleiðslan í bygdunum

var tengd at jørðini og bóndunum, og tað var ikki lætt hjá tí vanliga fólkinum at gifta seg, seta búgv og skapa sær eitt lív. Ein stórur partur av tí vanliga fólkinum í Føroyum í hesum tíðarskeiðinum vóru tí tænastufólk, húskallar og arbeiðsgentur á bóndagørðunum. Lønin á gørðunum var matur og klæðir, og átti man ikki jørð, var hetta í mongum førum einasti møguleiki hjá mongum at lívbjarga sær í tí gomlu bóndabygdini.

Um ár 1800 vóru tað eisini sum heild tær størstu markatalsbygdirnar, ið vóru tær fólkaríkastu. Tórshavn var, sum fyrisitingarligur miðstaður, størsta plássið og einasti keypstaður við sínum umleið 500 íbúgvum. Næst kom størsta markatalsbygdin Hvalba við uml. 200 íbúgvum, og hareftir komu hinar størru markatalsbygdirnar, Sandur, Sumba, Miðvágur, Kollafjørður, Fuglafjørður, Vestmanna og Eiði, allar við millum 120 og 170 íbúgvum (Madsen 1999). Felags fyri hesar størstu bygdirnar tá á døgum var, at allar, uttan Kollafjørður, høvdu ein størri ella minni part av jørðini í óðalsjørð. Teir smáu óðalsbøndurnir, sum áttu óðalsjørðina kundu tískil verða búsitandi í bygdini og liva av jørðini. Í mun til kongsbygdirnar, har kongsbøndurnir sótu á tilfeinginum, kundu vanlig fólk í nøkrum av óðalsbygdunum lívbjarga sær og seta búgv.

Eftir ár 1800 kom ein verulig vend í í teimum føroysku bygdunum. Fólkatalið, sum hevði ligið støðugt í fleiri hundrað ár, tók nú dik á seg og frá 1801 fram til 1850 vaks fólkatalið í Føroyum við umleið einum helmingi frá 5.272 til 8.114 (54% ella 1,1% í miðal árliga) (Madsen 1999 og Madsen 1995). Vøksturin í fólkatalinum í tíðarskeiðinum var galdandi fyri tær flestu bygdirnar í Føroyum, tó at onkrar vuksu meir enn aðrar. Ein av orsøkunum til vøksturin í fólkatalinum er, at tað í hesum tíðarskeiðinum hendi ein broyting í tí siðbundnu bóndabygdini. Fleiri vanlig fólk fingu møguleika at gifta seg, av tí at tey fingu eitt jarðarstykki, eina *trøð*, har tey kundu búseta seg og liva av saman við útróðri og øðrum fyrifallandi arbeiði.

Menningin í traðarbrúkunum í Føroyum var byrjað longu fyri ár 1800. Alsamt meiri av óðalsjørðini varð innlagt og velt. Hetta hevði við sær, at jørðin, við tað at hon varð velt og dýrkað, gav nógv meiri av sær, enn um hon lá sum hagi. Hendan intensiveringin av jørðini hevði, saman við tí fyribrigdi, at fleiri og fleiri menn fingu egnan bát, við sær, at ein familja kundi liva av einari trøð og útróðri til egna nýtslu. So við og við vórðu eisini

partar av kongsjørðini lagdir inn sum traðir, har fólk kundu búseta seg og skapa eitt liviligt lív. Traðarmenninir í bygdunum vóru tó enn í stóran mun bundnir at bóndunum, sum áttu jørðina, ið traðirnar vórðu lagdar út á. Traðarmaðurin mátti í mongum førum gjalda leigu til bóndan fyri trøðna og var seyðamaður ella fjallmaður hjá bóndanum og hjálpti til annars á garðinum við síðuna av traðarbrúkinum. Ikki fyrr enn seinni í 19. øld fingu traðarmenninir ognarrætt til traðirnar, við at teir sluppu at keypa tær. Traðarmenn kring Tórshavn fingu hendan rætt við lóg í 1863, meðan traðarmenninir úti á bygd ikki fingu rætt til at keypa teirra traðir fyrr enn í 1894 (Mitens 1953).

Í fyrstuni vórðu allar traðirnar innlagdar í heimbygdini, men ein partur av traðarmenningini var eisini, at menn settu seg niður burtur frá bygdini og grundaðu niðursetubygdir. Nógvar niðursetubygdir sóu dagsins ljós runt allar Føroyar upp gjøgnum 19. øld. Traðarmenninir í niðursetubygdunum vóru at rokna sum traðarmenninir í heimbygdini, og livdu á sama hátt av útróðri og traðarbrúkið.



*(Kortið er úr Johansen 1997)*

## Niðursetubygdirnar

Niðursetubygdirnar eru allar tær bygdirnar, ið ikki eru markatalsbygdir.

Flestu niðursetubygdir eru nær við eina størri markatalsbygd, og eru summar av hesum nú rættiliga stórar. Argir, Skopun, Norðdepil, Tvøroyri, Kambsdalur, Rituvík, Saltangará og Runavík er nakrar av teimum "best eydnaðu" niðursetubygdunum, og Tvøroyri og Runavík-Saltangará eru enntá vorðnir miðstaðir í teirra kommunum, meðan upprunaligu markatalsbygdirnar, Trongisvágur, Froðba og Glyvrar, hava havt minni vøkstur.

Aðrar niðursetubygdir hava ikki havt sama framburð, og nakrar teirra eru útdeyðar ella eru at meta sum ærgi. Hesar eru Akraberg, Víkarbyrgi/Hamrabyrgi, Fámará (allar í Suðuroynni), Hælur á Hesti, Víkar og Slættanes í Vágunum, Fossá á Borðoynni og Blankskáli á Kalsoynni.

Aðrar bygdir hava framvegis tænastu- og ídnaðarvirksemi á staðnum, men ongar íbúgvar. Hesar eru við Áir, og Nesvík í Streymoynni, Skálafjørður í Eysturoynni og Fossánes á Borðoynni. Eisini tvinnar markatalsbygdir hava fingið hesa lagnu, nevniliga Sund í Streymoynni og Strond á Borðoynni. Áhugavert, at báðar hesar síðstnevndu bygdir eru endaðar sum kraftverk.

Tann kongaligi einahandilin, sum varð stovnaður í 1709, hevði fram til 1830'ini bert havt eina handilstøð, nevniliga tann í Tinganesi í Tórshavn. Í seinnu helvt av 1830´unum vórðu tríggir úthandlar stovnaðir undir einahandlinum. Hesir komu at vera í Klaksvík (Norðuri í Vági), í Vestmanna og á Tvøroyri. Hesir úthandlar gjørdu tað lættari hjá fólkinum í nærøkinum at fara til handils at keypa og selja. Einahandilin tók fyri tað mesta bert ímóti ullarúrdráttum, hosum og troyggjum, men í 1840'unum byrjaði einahandilin í smáum at taka ímóti fiski, sum varð flaktur og saltaður og síðani útfluttur. Í byrjanini var hetta í smáum, men eftir at einahandilin varð avtikin í 1856, settu privatir handilsmenn seg niður úti í bygdunum, har teir tóku ímóti fiski og hagreiddu hann til útflutnings. Hesin nýggi marknaðurin fyri feskan fisk í Føroyum gjørdi, at útróðurin í alt størri mun gjørdist ein týdningarmikil hjávinna í teimum føroysku bygdunum. Serliga í niðursetubygdunum og hjá traðarmonnunum gjørdist útróðrarfiskiskapurin ein vinnuvegur, sum skapti vøkstur. Eitt dømi er niðursetubygdin Skopun, sum varð bygd í 1830'unum, men sum vaks úr bert 5 húsum við 33 fólkum í 1850 til 23 hús við 130 fólkum í 1880 (Finnsson 2005, 70).

Menningin av traðarbrúkunum og útróðrinum, saman við at tað eftir 1856 gjørdist lættari at avreiða fiskin til keypmenninar úti í bygdunum, gjørdi, at tað vanliga fólkið gjørdist minni og minni knýtt av bóndunum. Harafturímóti vórðu tey í alsamt størri mun knýtt at keypmanninum, ið keypti fiskin og sum kundi selja teimum neyðsynjarvørur av ymiskum slagi afturfyri. Tá tær fyrstu sluppirnar komu í 1870'unum og frameftir, gjørdist bygdafólkið alsamt meiri bundið at keypmanninum. Í mongum førum var keypmaðurin bæði reiðari, arbeiðsgevari á landi (við at salta og turka fiskin), keypari (av útróðrarfiski) og sølumaður (av gerandisvørum).

Bónda- og traðarmentanin frá siðbundnu bóndabygdini livdi víðari við tað, at fólk enn høvdu eina kúgv, seyð og veltu eplir, men í tí modernaðu fiskivinnubygdini gjørdist tann týdningarmesti livivegurin lønararbeiði á sjógvi og landi.

## Tann modernaða fiskivinnubygdin

Í seinnu helvt av 19. øld og byrjanini av 20. øld fara nakrar ávísar bygdir í Føroyum at vaksa skjótari enn hinar og í nøkrum førum nógv skjótari. Hetta eru tær sokallaðu fjarðarbygdirnar (Nielung 1968). Hesar bygdirnar eru: Vágur og Tvøroyri í Suðuroy, Sørvágur, Miðvágur og Sandavágur í Vágunum, Vestmanna í Streymoy, Fuglafjørður og bygdirnar við eystara arm av Skálafjørðinum í Eysturoy og Norðuri í Vági (seinni Klaksvík ella Klakksvík) í Norðoyggjum. Felags fyri hesar bygdirnar er, at tær liggja allar við eina góða náttúruhavn, og í flestu førum við ein góðan og væl vardan fjørð.

Í 1830'unum hevði Kongaligi einahandilin, sum nevnt, longu úthandlar á Tvøroyri, í Vestmanna og Norðuri í Vági. Hesir úthandlar og høvuðshandilin í Tinganesi í Tórshavn vórðu allir seldir á uppboði, tá einahandilin varð avtikin í 1856, og teir nýggju keypmenninir settu seg niður í handilshúsunum á hesum støðum og fóru at dríva handil. Hetta hevði í fyrstu atløgu við sær, at tann váðafúsi handilskapitalurin í samfelagnum varð knýttur at Havnini og hinum trimum bygdunum, har einahandilin hevði havt sínar úthandlar.

Skjótt fingu teir nýggju handlarnir tó smærri úthandlar í øðrum bygdum og longu tíðliga í 1860'unum var handil í teimum flestu størru bygdunum í Føroyum. Keypmenninir í úthandlunum úti í bygdunum fingu vøru frá høvuðshandlinum, sum teir seldu. Hinvegin tóku teir ímóti og saltaðu og turkaðu tann fiskin, sum varð avreiddur í bygdunum, og lótu hann víðari til høvuðshandilin til útflutnings. Í flestu bygdunum vardi hendan støða fram til endan av 19. øld. Aftaná hetta mistu fleiri av teimum stóru handlunum part av tí ávirkan, teir høvdu havt frammanundan, og alsamt fleiri lokalir keypmenn fóru undir egnan handil, arbeiddu fisk og gjørdust reiðarar.

Tær fyrstu sluppirnar komu í 1870'unum, men sluppfiskiskapurin undir Føroyum og við Ísland tók ikki rættiliga dik á seg fyrr enn í 1890'unum. Sluppflotin lá um 10-20 skip í 1870'unum og 1880'unum, men í 1890'unum var stórur vøkstur í sluppfiskiskapinum, og um ár 1900 vóru fleiri enn 80 sluppir í Føroyum. Tær fyrstu sluppirnar vórðu keyptar av fiskimonnum í felag, men frá 1890'unum gjørdist alt meira vanligt, at lokalir keypmenn yvirtóku ella keyptu sluppir. Eftir ár 1900 og fram til seinna heimsbardaga

vaks fiskivinnan, m.a. sluppfiskiskapur og útróður (sum var mannfólkaarbeiði) og tann tilknýtta framleiðslan av salt- og klippfiski á landi (sum í stóran mun var konufólkaarbeiði), soleiðis at fiskivinnan, sum frá leið, gjørdist største og berandi vinnan í Føroyum. Keypmenninir í bygdunum vóru í mongum førum bæði reiðarar og arbeiðsgevarar á landi, og tað vanliga fólkið var í flestu førum á onkran hátt nýtt sum arbeiðsmegi hjá keypmanninum, antin sum fiskimenn ella fiskikonur.

**Fordisman**

Størsti parturin av framleiðsluni í tí modernaðu fiskivinnubygdini var eftir "fordistiskum" meginreglum.

*Fordisman*, uppkallað eftir framleiðsluháttinum, sum amerikanski bilaframleiðarin Henry Ford í 1920'unum innførdi á sínum verksmiðjum, er bygd upp á mongdarframleiðslu av standardvørum. Ein av grundtankunum í fordismuni er, at mongdarframleiðsla gevur ein lægri eindarkostnað, tí at hvør liður í framleiðslukervinum fremur "rutiniseraðar" standarduppgávur og gerst harvið meiri spesialiseraður og meiri effektivur.

Menningin av føroyska ídnaðinum hevur eisini fylgt eini fordistiskari tankagongd, tí at neyðugt hevur alla tíðina verið at fingið meiri valuta burtur úr tilfeinginum. Fiskaframleiðsla er arbeiðsintensiv, og søluprísurin á lidnu vøruni er lutfalsliga lágur. Einasti máti at vinna pening burtur úr fiskaframleiðslu er tí at framleiða rímiliga stórar mongdir so effektivt sum gjørligt.

Størsti parturin av føroysku fiskivinnuni var tí fram til eftir annan heimsbardaga bygd upp á standardiseraða framleiðslu av salt- og klippfiski til útflutnings. Í 1950'unum og fram til endan av 1960'unum var hópframleiðslan av sild – bæði frystari og saltaðari – ein týðandi partur av framleiðsluni, og frá umleið 1970 og fram hevur framleiðsla av blokki og góðskaðum, feskum og frystum, fiskavørum verið bróðurparturin av framleiðsluni á flakavirkjunum kring landið.

Í dag er fordistiski framleiðsluhátturin enn tann mest útbreiddi framleiðsluhátturin í Føroyum, serliga innan fiskaframleiðslu. Seinastu árini hevur hesin framleiðluhátturin og fiskavirkini verið undir trýsti uttan úr heimi m.a. úr Russlandi og Kina, har tað ber til at framleiða nakrar av teimum somu fiskavørunum, sum føroyingar framleiða, men til nógv minni prís, tí at arbeiðslønin í hesum londum er so nógv lægri enn í Føroyum.

Arbeiðið á landi var í stóran mun knýtt at keypmonnunum í fjarðarbygdunum, og frá seinnu helvt av 19. øld síggja vit eina fólkaflyting frá teimum smærru bóndabygdunum til fjarðarbygdirnar. Í fjarðarbygdunum var arbeiði at fáa, og í flestu førum eisini møguleiki fyri at leggja sær trøð inn og byggja sær hús.

Hóast fjarðarbygdirnar vóru í stórum vøkstri í tíðini eftir aldaskiftið, avtoftaðust tær smáu bóndabygdirnar t.d. á útoyggjunum ikki. Tann stóri fólkavøksturin í Føroyum frá 11.099 fólkum í 1880 til 19.578 í 1925 (76,4% gjøgnum alt tíðarskeiðið ella 1,7% í

miðal árliga) kom eisini teimum smáu bygdunum til góðar (Fólkateljingarnar 1880 og 1925). Traðarbrúk, bjargarøkt og útróður vóru fram til 1950'ini enn ein týðandi partur av lívinum í bygdunum í Føroyum. Møguleikin hjá monnunum í teimum smáu bygdunum at fáa hýru umborð á skipunum gjørdi, at tað eisini var – og enn í dag er – gjørligt at fáa eina útkomu og liva í útjaðaranum. Seinnu árini hevur tað tó gingið støðugt niður eftir brekku hjá ytstu oyggjunum, serliga tí at tað er so trupult og dýrt at út- og innflyta vørur av oyggjunum. Ein onnur orsøk til, at fólk flyta av útoyggjunum, er, at tað er so trupult at nema sær útbúgving og at vera við í modernaða mentanarlívinum, um ein býr á útoyggj. At búgva á útoyggj er í sjálvum sær eitt lívsstílsval, men tað krevur at man frávelur ein stóran part av teimum møguleikum, ið modernaða samfelagið býður.

Á tí nýframvaksna føroyska arbeiðsmarknaðinum, har keypmenninir og reiðararnir eftirspurdu arbeiðsmegina hjá skipsmonnum og arbeiðsfólki, vóru ikki skipaðar umstøður í byrjanini. Men í byrjanini av 20. øld vórðu arbeiðsgevara- og fakfeløg stovnað í Føroyum. Hetta var ávirkað av menningini í Evropu, og serliga í Danmørk, har man fekk skipaðar umstøður á arbeiðsmarknaðinum um aldaskiftið. Skiparanir fingu sítt felag í 1896, reiðararnir sítt í 1909 og fiskimenninir sítt í 1911 (Jóansson 1975, 37). Á landi kom tað fyrsta lokala arbeiðsmannafelagið í 1915 (Enigheden, seinni nevnt Fylking á Tvøroyri) og frá 1920'unum og fram til 1950'ini vórðu umleið 40 lokal arbeiðsmannafeløg stovnað í Føroyum (Jóansson 1975, 340 ff). Feløgini fevndu í flestu førum um eina ella tvær bygdir, har allir menninir vóru limir. Eisini vóru nøkur arbeiðskvinnufeløg á teimum størru plássunum. Feløgini høvdu síðani sáttmálar við teir lokalu arbeiðsgevararnar, har arbeiðsgevararnir bundu seg til at lata eina fastsetta løn og harafturat bert at veita limum í lokala arbeiðsmannafelagnum arbeiði. Síðan 1949 hava lønarsamráðingarnar hjá teimum flestu lokalfeløgunum tó verið førdar av meginfelagnum, Føroya Arbeiðarafelag, ið varð stovnað í 1925, sum samráðist við Føroya Arbeiðsgevarafelag vegna limafeløgini.

Í fleiri førum førdi hendan "territorialiseringin" av arbeiðsmegini og arbeiðsatgeinginum í bygdunum til trætur millum arbeiðsmannafeløg um, hvør hevði rættin til at arbeiða hjá ávísum arbeiðsgevarum. Hetta var serliga í bygdum, sum lógu

nær hvørja aðra, og har sum arbeiði skifti millum teir ymisku arbeiðsgevararnar. Í slíkum førum var tað ikki óvanligt, at arbeiðarar úr ymsum bygdum og ymsum lokalfeløgum arbeiddu hjá sama arbeiðsgevara í styttri tíðarskeið.

Frá byrjan av arbeiddu arbeiðsmannafeløgini – sum lokal áhugafeløg – fyri at skapa arbeiði til teirra limir. Hetta var bæði fyri at skapa og reka arbeiðspláss, har limirnir kundu arbeiða, t.d. ”Arbeiðaranna trolvirki” og ”Ísvirkið” á Tvøroyri í 1930’unum. Men eisini royndu tey, saman við øðrum lokalum áhugabólkum, at fáa havnir og arbeiðspláss til at liggja á júst teirra øki heldur enn hinumegin bygdarmarkið (Finnsson 2005). Hetta, at arbeiðsmannafeløg – og í nøkrum førum eisini kommunur – hava átt partapening í lokalum virkjum, hevur hildið áfram til í dag, men var serliga vanligt í 1970’- og 1980 árunum. Nú er tað tó ólógligt hjá kommununum at eiga partapening í vinnurekandi fyritøkum, tí mett varð, at hendan skipan hevði verið ein av meginorsøkunum til, at føroyski búskapurin fór á glið í 1980’unum. Orsøkin hjá arbeiðsmannafeløgunum og kommununum til at eiga í fyritøkunum var í mongum førum eisini at skapa og varðveita lokal arbeiðspláss heldur enn at vinna pening burtur úr partabrøvunum. Tað eru mong lokal virki gjøgnum tey seinastu 30 árini, sum eru vorðin styrkt (konsoliderað) við slíkum lokalum kapitali, tá raksturin ikki hevur borið seg, og kreditorarnir hava bankað uppá dyrnar við hóttanum um tvingsilssølu.

Í byrjanini av 1970’unum fóru landsmyndugleikarnir undir tann sokallaða bygdarmenningarpolitikkin (Justinussen 1999). Hesin menningarpolitikkur snúði seg í stuttum um at menna tær føroysku bygdirnar hvør í sær við almennum stuðli, millum annað við at skapa fyritreytir fyri arbeiðsplássum í bygdini, serliga innan flakavinnuna.

Bygdarmenningarpolitikkurin skal síggjast sum ein mótreaksjón uppá *urbaniseringina*, ella býargerðina, í Føroyum, sum av álvara byrjaði aftan á annan heimsbardaga. Atgeingið til arbeiði (í Klaksvík og við Skálafjørðin í fiskivinnuni og vinnum knýttum at hesari; í Tórshavn í tí vaksandi almenna sektorinum) hevði við sær, at fólk í størri og størri mun fluttu til hesi støð. Serliga Tórshavn og bygdirnar rundanum (Hoyvík og Argir) hava seinastu 30 árini havt ein ógvuliga stóran vøkstur, og í dag býr umleið triðingurin av Føroya fólki í ”Stór-Tórshavn”.

Bygdarmenningarpolitikkurin var í stóran mun tengdur at teimum lokalu fólkavaldu á tingi og í kommununum, sum royndu at fáa fatur í hesum almennu menningarstuðulskrónunum til júst teirra valøki, kommunu ella bygd. Stuðul varð givin til bæði skip og virki úti í bygdunum, og skapti hetta ein ógvusligan yvirkapasitet í mun til fiskatilfeingi. Í teimum búskaparligu ógvuliga trongu tíðunum fyrst í 1990'unum, kundi hesin yvirdimensjoneraði skipaflotin og virkini úti í bygdunum ikki forrentast longur, og tað mesta fór so við og við á heysin. Hetta hevði við sær, at lítið og einki virksemi var í teimum flestu bygdunum í fyrru helvt í 90'árunum, og hevði hetta við sær, at stórur partur av fólkinum mátti flyta av landinum.

Samanumtikið kann sigast, at fiskivinnubygdin fram til 1980'ini var ein funksjonell eind, har øll framleiðslan á landi fór fram – á sama hátt, sum bóndabygdin hevði verið tað fram til umleið 1890. Tað er eisini úr hesum sjónarhorninum, at kommunumenningin í Føroyum í tíðarskeiðinum skal síggjast. Í 1872 vóru 8 kommunur í Føroyum og í 1967 vóru tær 50. Tær funksjonellu og framleiðandi eindirnar, sum bygdirnar vóru, høvdu ongan áhuga í at samstarva við aðrar bygdir á kommunala økinum, partvíst tí at tær kommunalu uppgávurnar vóru ógvuliga smáar heilt fram til aftan á annan heimsbardaga, so at sjálvt ógvuliga smáar kommunalar eindir kundu loysa hesar, og partvíst tí at bygdafólkið í einari bygd ikki hevði áhuga í at gjalda fyri t.d. eina havn ella ein bátahyl í einari aðrari bygd, sum tey ongantíð sjálvi fóru at nýta. Við heimild í kommunulógini vórðu kommunurnar eftir ynski úr bygdunum sostatt lutvíst býttar sundur í minni partar. Í 1972 kom ein nýggj kommunulóg, sum loyvdi samanlegging av kommunum, og eftir hetta hava vit verið vitni til eina byrjandi samanlegging av kommunum, sum hevur tikið dik á seg seinastu árini.




Ovara myndin vísir Nes sóknarkommunu frá 1912, sum allar bygdirnar á eystara armi á Skálafjørðinum vóru ein partur av. Niðara myndin vísir økið, eftir at sóknarkommunan í 1997 varð deild í tvær sjálvstøðugar kommunur: tí syðru Nes kommunu og tí Norðaru Runavíkar kommunu. Bygdirnar Rituvík, Runavík og Æðuvík hoyra í dag til Runavíkar kommunu.




*(Kort: Finnsson 2005)*

## Nes sóknarkommuna: Dømi um eitt kommunusundurbýti í nýggjari tíð

Í 1967 varð Nes sóknarkommuna á eystara armi av Skálafjørðinum býtt sundur í tvær sjálvstøðugar kommunur; tí syðru Nes kommunu og tí norðaru Runavíkar kommunu.

Seinast í 1950'árunum tók ósemja seg upp millum arbeiðsmannafeløgini í tveimum teimum størru bygdunum í kommununi, Toftir og Glyvrar/Saltangará, um hvat felag hevði rættin til arbeiðið við fiskivinnuhavnina í Saltangará, sum var størsta arbeiðsplássið í kommununi, og sum stóð til at verða munandi útbygd.

Síðan 1930'árini høvdu tey lokalu arbeiðsmannafeløgini í bygdunum í kommununi havt sáttmálar við lokalar arbeiðsgevarar, keypmenn og reiðarar í bygdunum um, hvar limirnir hjá lokalfeløgunum skuldu arbeiða.

Fyrst í 1950'árunum var ein størri fiskivinnuhavn bygd í Saltangará, og hevði hetta við sær, at ein partur av teimum lokalu arbeiðsgevarunum, m.a. eisini høvuðsarbeiðsgevarin hjá lokalfelagnum á Toftum, D.P. Højgaard, valdi at leggja sítt virksemi við ta nýggju havnina. Hetta hevði við sær broyttar fyritreytir fyri arbeiðsmegina í kommununi, serliga fyri toftamenn, sum nú í stóran mun máttu pendla til og frá arbeiði í Saltangará.

Ósemjan millum lokalfeløgini um arbeiðsrættin við havnina í Saltangará hevði við sær, at Arbeiðsmannafelagið á Toftum og lokalu limirnir í sóknarráðnum kravdu, at tann ætlaða útbyggingin av havnini í Saltangará skuldi leggjast á Toftum. Tá meiriluti ikki kundi fáast fyri hesum í sóknarráðnum, valdu Toftamenn at framleggja krav fyri landsstýrið um, at kommunan skuldi býtast í tveir partar. Á henda hátt kundu toftamenn – sum sjálvstøðug kommuna – søkja landsstýrið um stuðul til havnabygging á Toftum.

Eftir eitt langt stríð millum meirilutan í sóknarráðnum og toftamenn, legði landsstýrið endiliga upp í stríðið og útskrivaði í 1965 eina fólkaatkvøðu um sundurbýting av kommununi. Úrslitið varð, at tær tríggjar niðursetubygdirnar; Æðuvík í Neshaga og Rituvík og Runavík í Toftahaga, valdu at fara upp í ta nýggju Runavíkar kommunu, meðan einans Nes, Toftir og Saltnes myndaðu ta nýggju Nes kommunu.

Eftir ósemju millum partarnar m.a. um, hvar markið millum tær báðar nýggju kommunurnar skuldi ganga, og hvussu ognir og skuld í gomlu sóknarkommununi skuldi býtast, bleiv gamla sóknarkommunan tann 1. Apríl í 1967 so endaliga deild sundur. Endin á stríðnum um havnabyggingina í kommununi varð, at toftamenn nú fingu sína havn á Toftum, har flest toftamenn arbeiddu, meðan "innanmenn" fingu sína havnaútbygging í Saltangará, har flest "innanmenn" arbeiddu. Sostatt fekk økið tvær smærri havnir, heldur enn eina stóra havn.

# Úr bygd í bý – býargerðing av samfelagnum

Bygdin hevur síðani miðøldina verið ein tann mest týðandi karmurin fyri lívið og virkið hjá føroyinginum. Mentanarliga hevur bygdin verið sum ein víðkað familja, sum eitt stað, har øll kendu øll. Við tíðini eru nógvar av bygdunum tó vorðnar so stórar, at ógjørligt er at kenna øll í bygdini, hóast ein møguliga hevur samband við tey flestu á eins egna aldri og við familju og grannar. Hendan broytingin byrjaði longu við fiskivinnusamfelagnum, tá fólk byrjaðu at flyta av smáplássunum og inn á firðirnar og harvið eisini víðkaðu um sjónarringin, og upp gjøgnum alla tjúgundu øld er hendan støðan bara staðfest. Føroyar hava hesi seinastu 200 árini ment seg frá at vera ein rúgva av spjaddum bygdasamfeløgum til alsamt at gerast eitt meiri samanhangandi og samantvinnað samfelag.

Eitt rák, ið hevur havt avgerandi týdning fyri menningina av føroysku bygdini, er, at tað er vorðið alsamt betri samband millum bygdirnar. Meðan tað heilt upp til millumkrígstíðina var ein styrki hjá eini bygd at liggja fjarskotin, hevur at kalla allur fólkavøksturin í Føroyum seinastu tíggju (ella meira) árini verið í bygdum, ið hava havt rímiligt ferðasamband við aðrar bygdir og – ikki minst – við størru býirnar í landinum.

Fyrsta samferðsluliga frambrotið í 20'undu øld var samanknýtingin av landinum við regluligum bátasambandi. Í 1895 lat Mortensen á Tvøroyri byggja fyrsta Smiril, ið sigldi regluliga millum oyggjar, og fyrsti regluligi postbáturin millum bygdir byrjaði at sigla millum Havnina og bygdirnar á Skálafjørðinum í 1908, og síðani hevur samanbindingin av Føroyum tikið dik á seg. Hetta viðførdi í sjálvum sær, at lættari varð at ferðast og at flyta góðs millum bygdir og oyggjar. Millum heimsbardagarnar byrjaði harumframt enn eitt rák, tá oyggjarnar og firðirnir so við og við vórðu knýttar saman sum øki í sær sjálvum, ið harvið kundu menna ein lokalan dynamikk, ið ikki einans tók støði í sjálvari bygdini, men fevndi um heilar ella hálvar oyggjar. Fyrsti vegurin millum bygdir kom í 1916 (vegurin millum Sands og Skopun), og í 1922 kom tann fyrsti bilurin til Føroyar. Hetta rákið byrjaði við vegum, men kom frá síðst í 1960'unum til eisini at fevna um tunlar. Gásadalur var í 2003 síðsta bygdin á meginlandinum, ið fekk fast samband. Men longu í 1980'unum vórðu nøkur av gomlu vegastrekkjunum umbygd við tunlum. Leirvíkstunnilin kom í staðin fyri leirvíksvegin; Kollafjarðartunnilin kom í

staðin fyri oyggjarvegin, og nú er Landsverk harumframt farið undir at gera tunnil millum Øravík og Hov, tí at gamli vegurin upp um Hovsegg ikki er tíðarhóskandi longur. Harumframt verður tosað um at gera nýggjar tunnlar á Borðoynni, um at dagføra tunnilin millum Tvøroyri og Hvalba, eins og tosað verður um at gera tunnil til Viðareiðis í staðin fyri núverandi vandamikla strekkið.

Samanbindingin av økjunum førdi aftur við sær eitt annað rák, nevniliga at strandferðslan nú fekk til uppgávu at samanbinda heil øki og ikki bara einstakar bygdir. Drúgvu ferðirnar fram við firðum og sundum vórðu nú avloystar av styttri teinum millum tvær bygdir, ið sostatt samanbundu tvey øki, ið vóru innanhýsis samanbundin av vegum. Seinasta rákið byrjaði so smátt í 1973 og 1975'unum, tá ið ávikavist brúgvin um Sundalagið og byrgingin um Hvannasund vórðu bygdar. Hetta var samstundis byrjunarskotið til eina tilgongd, ið seinni fór at binda meginpartin av Føroyum saman í eitt stórt meginland. Um sama mundið varð Viðoyggin knýtt at Borðoynni, og nakað seinni varð eisini Kunoyggin knýtt at Borðoynni. Síðani var ætlanin at knýta Vágarnar at Streymoynni, men stígur kom í vegna drál og eina lemjandi búskaparkreppu í nítiárunum. Eftir kreppuna gjørdist aftur pláss á fíggjarlógini til størri útbyggingar av samferðslukervinum, og Vágatunnilin gjørdist endiliga veruleiki í 2004, og í 2006 verða eisini stóru Norðoyggjarnar, Borðoy, Viðoy og Kunoy knýttar at Eysturoynni, soleiðis at millum 85 og 90 % av øllum føroyingum brátt búgva í einum stórum meginlandi.

**Týðandi árstøl í moderniseringini av føroyska samferðslukervinum**

1895: Fyrsti Smiril, sum Mortensen á Tvøroyri lat byggja til innanoyggja sigling
1908: Fyrsti regluligi postbátur – millum Tórshavn og bygdirnar kring Skálafjørðin
1916: Fyrsti millumbygdavegur verður bygdur millum Skopun og Sands
1963: Flogvøllurin í Sørvági, ið varð bygdur undir 2.heimsbardaga, verður tikin í nýtslu til sivilt endamál.
1963: Fyrsti tunnilin verður bygdur – millum Hvalba og Trongisvág
1973: Fyrsta brúgvin/byrgingin verður bygd – um Sundalagið
2002: Fyrsti undirsjóvartunnilin verður bygdur – um Vestmannasund

Yvirskipaða menningin av Føroyum hesa seinastu øldina hevur sostatt verið, at bygdirnar so smátt eru avloystar av alsamt størri økjum, soleiðis at vit í dag mega tosa um alt meginlandið sum eitt stórt, dynamiskt øki, bæði hvat viðvíkur arbeiðsmarknaði,

skúlaskapi, framleiðslu, tænastuvirksemi og ikki minst frítíðartilboðum og nógvum øðrum.

Sostatt verður bygdin ongantíð aftur tann sama, sum hon var – ella tyktist at vera – fram til kreppuna. Bygdarmenningarpolitikkurin breyt saman, og í staðin trein eitt nýtt hugtak fram á pallin: økismenning. Hetta hugtak hevur havt eitt ávíst viðrák hesi seinastu tíggju árini, síðani kreppan hæsaði av. Hóast ætlanirnar um at umskipa Føroyar til økiskommunur heldur enn bygdarkommunur longu var á lofti í 1997 (Kommununevndin 1997-98) og í grundini hevur røtur heilt aftur í sekstiárini, so er tað ikki fyrr enn hesi seinastu fáu árini, at vit veruliga eru farin at síggja økiskommunur í Føroyum. Í Suðurstreymi eru Hest, Kirkjubøar, Nólsoyar og Kollafjarðar kommunur lagdar saman við (ella: "undir") Tórshavnar kommunu, í Sundalagnum hava flestu kommunurnar kring sundið tikið seg saman í eina stóra felagskommunu, og í Eysturoynni, í Norðoyggjunum og í Vágum tykist tað einans vera ein spurningur um tíð, áðrenn vit eisini her fara at síggja veruligar økiskommunur. Men hetta rákið hevur so aftur við sær, at tað ikki longur er samsvar millum bygdina og kommununa, sum tað í stóran mun hevur verið síðani millumkrígstíðina, tá eisini heilt smáar bygdir fóru hvør til sítt, so tær betur kundu ráða yvir íløgum av ymiskum slagi. Bygdirnar standa tískil fyri nøkrum stórum avbjóðingum, og bert tíðin kann vísa, hvørjar bygdir fara at hava viðrák í framtíðini.

## Hvat er ein bygd í 2006?

Áðrenn vit fara víðari, er vert at gera sær far um, hvat ein bygd í grundini er í einum føroyskum høpi ár 2006. Munurin á býi og bygd er avgerandi fyri at kunna skilja, hvat ein bygd í grundini er, og hesin spurningur er ikki léttur at svara, tí tað finst eingin greið skilmarking. Mest nýtta skilmarkingin millum bygd og bý er tó talið 1.500. Spyrt tú onkran, um eitt búpláss er ein bygd ella ein býur, so svarar viðkomandi helst, at tað er ein býur, um har búgva 1.500 ella fleiri fólk, og ein bygd, um har búgva færri enn 1.500 fólk. Onnur eru, ið halda, at einans Tórshavn og Klaksvík kunnu metast sum býir, og uppaftur onnur halda, at einans Tórshavn hevur uppiborið heitið "býur", ið enntá er sera lítil samanborin við aðrar býir í okkara grannalondum.

Um vit so halda okkum til talið 1.500, so er heldur ikki heilt greitt, hvat skal teljast við, tá vit tosa um ein bý. Sambært kommunulógini, §4 (Løgtingslóg nr.84, 2000), er Fuglafjørður ein býur, tí í Fuglafjarðar kommunu búgva fleiri enn 1.500 íbúgvar. Men av teimum 1.574, sum búgva í Fuglafjarðar kommunu (tann 31. avgust 2005) búgva fleiri enn 200 í antin Kambsdali ella á Hellunum, og sostatt búgva færri enn 1.500 í sjálvum býnum. Sambært lógini hevur Fuglafjørður sostatt rætt til at nevna seg bý, hóast tað búgva færri enn 1.500 fólk í sjálvum Fuglafirði.

Ein annar trupulleiki stingur seg upp, nú kommunurnar eru vorðnar lagdar saman. Í tí samanløgdu Sunda kommunu búgva nú knappliga fleiri enn 1.500 fólk, hóast eingin av bygdunum telur meiri enn 300 íbúgvar (í Hósvík búðu 300 fólk tann 31. avgust 2005). Sambært lógini hevur Sunda kommuna rætt til at kalla seg ein bý, hóast hetta í grundini er meiningsleyst, tí at talan er um eina samanlegging av nógvum, smáum bygdarkommunum. Kommunan hevur tó higartil valt ikki at taka býarheitið til sín. Sami trupulleiki ger seg galdandi í teirri nýggju Runavíkar kommunu, har umleið 3.656 fólk búgva (31. avgust 2005), hóast minni enn helmingurin (1.717 tann 31. avgust 2005) býr í sokallaða "býarøkinum" Runavík/Saltangará/Glyvrar. Hinvegin búgva góð 1.200 fólk beint hinumegin markið í Nes kommunu og sostatt ikki í einum býi, hóast Nes/Toftir/Saltangará øki í grundini hongur saman við Runavík, bæði geografiskt, men eisini funksjonelt. Tað áhugaverda er tó, at tað júst var av funksjonellum ávum, at Nes Sókn varð býtt upp í tvær kommunur í 1967. Síðani tá eru umstøðurnar tó nógv broyttar; bygdarmenningarpolitikkurin er farin í ommu sína, og kommunurnar hava mist tann stóra vinnufremjandi týdningin, tær einaferð høvdu. Funksjonelt verða Nes og Runavíkar kommunur tó alsamt meiri knýttar at hvørji aðrari, og væntandi er, at tær fara at leggja saman um fá ár.

Men hvat er so ein býur, og hvat er ein bygd? Svarið má, sum sagt, vera, at tað ikki finst nakað nøktandi, objektivt svar frægari enn "1.500-markið". Hinvegin kunnu vit velja eitt subjektivt svar, har vit snøgt sagt siga, at tey búpláss, ið gera krav uppá at vera býir, eru býir. Hesi búpláss eru: Tórshavn, Klaksvík, Fuglafjørður, Runavík, Tvøroyri og Vágur, hóast Vágur sambært "1.500-markinum" ikki hevur rætt til hetta heitið.

Í Sundalagnum og í Sandoynni eru eingi búpláss, ið eru líkinda stór at kunna nevnast býur, og í Vágunum hevur eingin av bygdunum valt at stremba eftir at gerast býur, hóast Miðvágur og Sandavágur jú í grundini eru ein og sami býur, bara hvør sínu megin kommunumarkið.

Ikki er neyðugt at lenda á einari fullgreiðari skilamarking, men undir øllum umstøðum er neyðugt at skilja, at markið millum bygd og bý er sera ógreitt. Í næsta parti fara vit tískil at endurskoða bygdina á ein heilt nýggjan hátt, ið ikki hevur verið vanligur í Føroyum, tí at siðbundna fatanin av bygdini, har bygdirnar hvør í sær hava verið sæddar sum produktivar og funksjonellar eindir heilt fram til okkara dagar, hevur staðið sum negld føst í føroysku samfelagsfatanini.

## Mótbýargerðin – mótvegis eini postmodernaðari bygd?

Býargerðin av føroyska samfelagnum steðgaði ikki upp við kreppuni í 90'unum, heldur tvørturímóti. Eftir kreppuna hevur býargerðin av føroyska samfelagnum veruliga tikið dik á seg, kanska serliga tí at arbeiðsplássini innan fiskivinnuna í nógvum bygdum eru fánað burt ella eru miðsavnað í fáum størri bygdum. Eitt mynstur tykist tó at kunna síggjast: Atgeingið hevur fingið størri týdning enn nakrantíð fyrr. Tær bygdirnar, ið liggja upp at alfaravegunum millum stóru býirnar eru farnar at vaksa – ikki bara eitt sindur, men við rúkandi ferð. Serliga bygdirnar kring Sundalagið hava havt stóran fólkavøkstur hesi seinastu tíggju árini, ja í grundini størri fólkavøkstur enn høvuðsstaðurin, um roknað verður í prosentum. Í bygdum sum Hvalvík og Hósvík eru tey seinastu árini nógv hús bygd, og verða nógv hús framhaldandi bygd, og so leingi samfelagsbúskaparliga sveiggið ikki av álvara byrjar at sveiggja niðureftir, er lítið, ið bendir á, at henda bygging fer at steðga.




## Føroyski vakstrarásin

Síðani kreppuna hevur at kalla allur fólkavøkstur verið miðsavnaður í stóru býunum og økjunum millum stóru býirnar, Tórshavn, Runavík og Klaksvík. Áhugavert er tó, at í prosentum hevur vøksturin verið allarstørstur í nøkrum av kommununum, ið liggja millum stóru býirnar; ikki í býunum sjálvum.

Hetta stendst serliga av, at húsaprísirnir eru so høgir í býunum, at fólk velja heldur at búseta seg í onkrari grannakommunu, so húsini ikki gerast so dýr. Vegirnir á Meginlandinum eru so góðir í dag, at tað væl ber til at pendla millum bygd og bý.

Ein onnur orsøk til, at hesar bygdirnar eru vaksnar, er tó eisini, at fólk knappliga hava møguleika at verða búgvandi í heimbygdini, hóast tey fáa arbeiði onkra aðrastaðni á Meginlandinum. Um ein maður t.d. fær starv í Tórshavn, nýtist honum ikki at flyta úr heimbygdini, men hann kann verða búgvandi, har hann er uppvaksin og hevur familju og kenningar.

Orsøkin til, at tað kann vera skilagott at tosa um ein ”vakstrarás” heldur enn um eitt ”vakstrarøki”, er, at fólkavøksturin (og eisini búskaparvøksturin) er so tætt tengdur at farleiðini millum stóru býirnar. Meðan bygdirnar kring djúpu firðirnar í gomlum døgum høvdu ein kappingarfyrimun í mun til aðrar bygdir, eru tað í dag tær bygdirnar, ið hava best vegasamband, ið hava ein kappingarfyrimun í mun til aðrar bygdir. Við øðrum orðum er tað hend ein strukturel broyting í føroyska samfelagnum frá einum territoriumssamfelagi til eitt mobilitetssamfelag, og hevur hetta júst við sær, at gomlu lokalu territoriuni – kommunurnar og markatalsbygdirnar – missa týdning og verða avloyst av einum at kalla markleysum Meginlandi.

Kortið vísir vegakervið í Føroya norðaru helvt. Mest ferðsla er sum vera man millum Tórshavn, Runavík og Klaksvík.

Men eisini aðrar bygdir á meginlandinum, ið antin liggja væl fyri ella hava vakurt útsýni klára seg sera væl. Fjarskotnu bygdirnar, serliga í útoyggjunum, standa hinvegin fyri

falli, tí at fá børn verða fødd, og tey, ið eru, hava lyndi at flyta av oynni, tá tey gerast eldri. Eftir eru so fyri tað mesta eldri fólk, bøndur og gamlir dreingir, ið eru til skips meginpartin av árinum. Men bygdirnar á meginlandinum stórtrívast. Barnafamiljur flyta til og byggja hús og skapa trivnað í bygdini. Bygdin er eitt gott alternativ til býirnar (serliga Tórshavn) hjá nógvum føroyingum, tí at grundstykkini eru bíligari á bygd og plássið og tryggleikin er størri hjá børnunum, ið kunnu renna millum húsini og spæla, heldur enn at noyðast at sita inni í stovuni og spæla telduspøl. Eisini hevur tað nakað at siga, at skrivstovuveldið er minni á bygd enn í býunum, og tí hevur ein nakað væl størri frælsi, tá ein byggir á bygd enn t.d. í einum gjøgnumplanløgdum býlingi í Havn.

Men her er ikki talan um ta gomlu føroysku bygdina. Hesar bygdirnar, ið eru farnar at vaksa seinastu árini, líkjast nógv einari gamlari, føroyskari bygd, um tú einans koyrir framvið eftir høvuðsvegnum. Men hyggur tú nærri eftir, so leggur tú til merkis, at nakað avgerandi er broytt. Gamla føroyska bygdin var eitt sokallað “framleiðsluregimi”, eitt stað, har heimið og arbeiðið áttu rúm innan fyri somu karmar. Hetta var eisini galdandi seinni í tíðini, tá fiskivinnan avloysti landbúnaðin sum høvuðsframleiðsla, men nú á døgum hevur eitt heilt annað rák tikið seg upp í bygdunum: Bygdirnar eru í stóran mun vorðnar ”sovibygdir”.

At búgva í eini bygd, ið liggur upp at høvuðsvegnum, gevur serstakliga góðar arbeiðsmøguleikar í nógvar ættir. Býrt tú t.d. í Hvalvík, so býrt tú at kalla miðskeiðis millum Tórshavn, Klaksvík og Runavík, ja, tú býrt í grundini miðskeiðis í øllum føroyska meginlandinum, ið hesi seinastu fáu árini er víðkað við Vágunum fyri vestan og trimum Norðoyggjum fyri eystan. Tú hevur tískil møguleikar at arbeiða, nærum hvar tað skal vera á meginlandinum, um tú væl at merkja hevur bil. Og bilurin er vorðin alneyðugur, um tú vilt búgva á bygd í Føroyum. Eitt er tað, at arbeiðsplássið ikki longur sum nakað sjálvsagt er á sama staði sum ein býr, men hartil kemur, at eisini tænastuútboðið er farið at vikna í bygdunum. Posthús-, banka- og sparikassadeildir eru afturlatnar í nógvum minni og meðalstórum bygdum á meginlandinum, og eisini bygdahandlarnir eru minkaðir í stórum hesi seinastu 20-30 árini, partvíst tí at trupult er at kappast við prísir og útboð í teimum stóru býarhandlunum, og partvíst tí fólk heldur velja at keypa inn, har tey arbeiða, ella koyra inn í býirnar at keypa inn. Í Sundalagnum

hava tey tó verið so framsíggin at seta á stovn ein stórhandil í Norðskála, ið skal forða fyri, at alt handilslívið hvørvur úr økinum, og tað sama er eftir øllum at døma eisini við at henda í Gøtudali, ið kemur at liggja sera miðskeiðis, nú Norðoyatunnilin gerst veruleiki.

## Ímyndin um bústaðið

Syðrugøta er ein bygd á Føroyska vaktrarásinum, ið hevur havt eina sera stóra tilflyting hesi seinastu árini. Tað áhugaverda við teimum fólkunum, ið eru í ferð við at búseta seg í Syðrugøtu, er, at tað hevur minni týdning um handil er í bygdini, tí at tey flestu hava bil og kanska arbeiða í onkrari aðrari bygd ella býi. Harumframt er tað at kalla líkamikið, um arbeiði er á staðnum, tí tað er so stutt at koyra úr Syðrugøtu til t.d. Norðragøtu, Fuglafjarðar ella Runavíkar.

Tað, ið hinvegin hevur týdning, er, at skúlin og barnaansingin hava neyðugu dygdina, og at bygdin annars hevur eitt gott orð á sær. Tað at kunna skapa eitt gott frítíðarumhvørvi fyri familjuna kring bústaðin verður mett sum ein tann fremsta dygdin hjá Syðrugøtu, og á henda hátt er Syðrugøta eitt gott dømi um eina føroyska ”sovibygd”, ið minnir meiri um ein forstað enn um eina veruliga bygd. Hinvegin hevur ”bygdarlagið”, tað at bygdin er vøkur, eisini nógv at siga fyri trivnaðin í bygdini. ”Ímyndin av bústaðnum” hevur fingið alsamt størri týdning, og sostatt ber ikki longur til at tosa um hvørki bústaðin ella bygdina sum eina funksjonella eind.

Vilt tú búgva í einari føroyskari bygd á meginlandinum í Føroyum í dag, er treytin sostatt at tú hevur ein bil, tí hevur tú ongan bil, so hevur tú eisini minkað avgerandi um møguleikarnar hjá tær í gerandisdegnum, hóast tú kanst nýta bussin. Hetta gera summi, men tað tekur longri tíð, og túrarnir passa ikki altíð við tað, sum tú ætlar. Og spyrt tú yngri fólk, so verður greitt, at ikki bert arbeiðs- og tænastumøguleikarnir økjast, tá koyrikortið kemur í hús, sosialu møguleikarnir økjast eisini. At koyra bil er í dag eitt av stóru frítíðarítrivunum hjá nógvum yngri fólki á bygd. Hevur tú ikki atgeingi til ein bil, so ert tú illa sperd/ur sosialt, tí tá verður knappliga trupult at sleppa til tey ymisku støðini, har ungdómar finna saman í dag. Fyri fólk á bygd er bilurin tískil ein av grundarsteinunum undir tí at búgva í eini bygd. Býrt tú í býnum, kanst tú klára teg uttan bil, men býrt tú á bygd og skalt dúva upp á bussar, ið koyra heldur sjáldan, er tín persónligi mobilitetur knappliga við skerdan lut.

Taka vit saman um, kunnu vit siga, at bygdin, ið áður var at meta sum ein avmarkað sosial og funksjonell eind, er vorðin ein partur av eini størri heild. Mørkini millum bygdirnar eru viskað burtur og hava í dag nógvastaðni einans týdning í mun til seyðahald og tílíkt, meðan bróðurparturin av samfelagslívinum í bygdini er

samantvinnað við samfelagslívið í øðrum bygdum og í býunum. Ein ábending um hesa regionaliseringina av bygdarsamfeløgunum er menningin í kommunum hesi seinastu árini, har fleiri og fleiri av teimum minnu bygdarkommununum velja at leggja saman í størri kommunalar eindir. Tær einstøku bygdirnar eru við at missa sín leiklut sum funksjonellar eindir og verða noyddar at hóska seg inn í ein ”post-modernaðan” samanhang, har fólk hava ein grundleggjandi størri møguleika at velja og vraka millum ymiskar tættir í samfelagslívinum .

Á hendan hátt eru stórir partar av føroyska samfelagnum at meta sum eitt netverkssamfelag (t.d. Castells 1996), har bygdirnar hvør sær eru meiri at kalla býlingar í stóra føroyska ”netverksbýnum”, ið aftur er ein partur av stóra globala heimssamfelagnum. Hetta er eisini tað, vit rópa fyri altjóðagerð niðrifrá, t.v.s. at altjóðagerðin ikki einans er ein uttaneftirkomandi megi, ið broytir okkara gerandisdag, men at vit sjálvi eru við til at laga okkara gerandisdag í mun til tey mangan hørðu krøvini, ið altjóðagerðin setur, t.d. tá arbeiðspláss fara av landinum og endurskapast í t.d. Eysturevropa. Í einum altjóðagjørdum heimi kann ein ikki longur vænta at sleppa at arbeiða á sama staði alt lívið, eins og tað var vanligt í fiskivinnubygdini og ikki minst í bóndabygdini. Heimurin er ikki eins støðugur, og hann plagdi at vera. Heimurin verður alsamt meiri umbroytiligur, og tískil verður tað ein avgerandi persónlig dygd alla tíðina at duga at laga seg til nýggj krøv og nýggjar umstøður. Hetta kann gerast við at trároyna møguleikarnar á staðnum, men eisini við at gerast mobil/ur og sostatt royna at finna møguleikar aðrastaðni enn í heimbygdini – ja kanska enntá í útlandinum.

Bygdirnar eru soleiðis lagdar undir postmodernaðar treytir, og vilja vit enntá skjóta upp, at vit nevna Føroysku bygdina ár 2006 fyri eina ”postmodernaða bygd”; eina bygd, ið ein kann nýta til tað, ein vil – sum sovibygd, arbeiðsbygd, hugnabygd, ella hvat man nú heldur seg hava tørv á í gerandisdegnum. At liva á bygd er nú á døgum meiri at meta sum ein lívsstílur enn sum ein lagna. Ein hevur í dag møguleikan bæði at velja og at frávelja bygdina. (Matras Kristiansen 2005, 77-80) Ein er ikki longur bundin at einum kongsbónda ella at eini slupp, sum ein var í ávikavist siðbundnu og modernaðu fiskivinnubygdini, og lykilin til hetta økta frælsið er fyrst og fremst betraðu samferðslumøguleikarnir.

**Postmodernitetur, hvat er tað?**

Tá vit tosa um útbyggingina av samfelagnum, tosa vit viðhvørt eisini um moderniseringina av samfelagnum. At modernisera samfelagið er at skipa samfelagið á ein rationellan hátt, soleiðis at tað fær ein vælvirkandi ”struktur”. At modernisera samfelagið kann t.d. vera at skapa hóskandi kommunalar eindir, ið megna at lyfta tær uppgávur, teimum er givið, ella at binda bygdir og øki saman við vegum, tunlum og ferjum, elveitingum og telefonkáplum. Men at modernisera samfelagið snýr seg eisini um at útbúgva fólkið, soleiðis at tey megna at røkja allar tær nýggju arbeiðsuppgávurnar, ið fylgja við tøkniligu menningini, men eisini megna at skilja og góðtaka samfelagsliga fjølbroytni, ið stendst av, at framleiðslutólini ikki longur eru einføld (sum t.d. spakar og rívur), men krevja ”ekspertisu” fyri at verða rikin við skili. Tí hevur skúlin verið ein týðandi partur í uppalingini av ”modernaðum menniskjum”.

Vit tosa í dag um, at vit liva í einum modernaðum samfelagi, har fólk eru skúlað og upplýst. Men samstundis sum fólk vita meiri enn nakrantíð áður og hava betri kor enn nakrantíð áður, eru eisini alsamt fleiri ting, ið fólk ikki skilja. Jú meiri man veit, tess meiri veit man, at man ikki veit. Hetta merkir, at stórir partar av samfelagnum gerast óskilligir, ja í summum førum vandamiklir. At liva í samfelagnum verður tengt at ”vanda”, hóast samfelagið júst er skapt fyri at veita trygd. Vit liva sostatt í einum ”vandasamfelagi”, har vit ikki longur hava vald á okkara lívsførslu. Sostatt missa summi fólk álit á modernaða samfelagnum og velja heldur aðrar leiðir, t.d. rúsevnismisnýtslu ella – hinvegin – fundamentalistiska trúgv.

Sostatt liva vit – halda summi – í einum postmodernaðum samfelagi, har øll fólk ikki longur hava sama fatan av veruleikanum, og sostatt hava fólk sera ymiskar tilverur. Fólk kunnu sostatt velja sær tað lív, teimum lystir, og eru ikki longur tengd at einum felags samleika.

Eitt sera gott dømi um, at fólk verða slitin leys frá heimbygdini og tveitt inn í nýggjar samanhangir, eru føroysku miðnámsskúlarnir. Við at fara í skúla ber til at víðka sosiala netverkið og sostatt at vinna sær fleiri møguleikar enn teir fáu, ið eru at finna í heimbygdini. Miðnámsskúlarnir og teknisku skúlarnir í Føroyum skapa nýggj sosial øki við at knýta ungdómar frá ymiskum økjum saman. Til dømis eru miðnámsskúlarnir á Kambsdali við til at knýta ungdómar frá Norðoyggjum, Eysturoynni og Sundalagnum saman, soleiðis at framtíðin kanska fer at knýta alt hetta stóra økið saman í eina savnandi región.

## Bygdin og framtíðin

Bygdin hevur síðani miðøldina verið ein grundarsteinur undir føroyska samfelagnum og er tað enn. Men við teimum samfelagsligu broytingunum, ið hava broytt samfelagið grundleggjandi hesi seinastu hundrað árini, er leikluturin hjá bygdini í samfelagnum avgerandi broyttur. Eyðun Andreassen (1992), professari, hevur lýst at kalla alla tjúgundu øld sum eina stóra niðurbróting av tí siðbundna bygdarsamfelagnum og harvið eisini bygdarmentanini, ið okkum dámar so væl at trívast í, tá vit skulu savnast kring tað

serstakt føroyska, m.a. føroyska dansin. Bygdin umboðar tað gamla og tað trygga; hon umboðar nakað grundleggjandi øðrvísi enn býurin. Men hóast hetta, so er bygdin á nógvar hættir líka modernað sum býurin, hóast býarfólk í egnari sjálvsfatan mangan vilja tvíhalda um tað øvugta. Bygdin í dag er á ein løgnan hátt bæði modernað og siðbundin, og tað hevur hon kanska verið leingi. Bygdin í dag er, mett við búskaparfrøðiligum hugtøkum, vorðin ein partur av stóra samfelagnum – stórsamfelagnum. Við øðrum orðum er ”Gemeinschaft” vorðið til ”Gesellschaft”. Men tað dámliga við bygdini er júst, at hon vendir sær aftur í tíðina og harvið kann tykjast, sum um hon hevur staðið í stað í mun til býirnar.

**Gemeinschaft og Gesellschaft,**
**tvey grundleggjandi samfelagsfrøðihugtøk**

Vanligt er millum samfelagsfrøðingar at skilja millum tvær samfelagsfatanir, Gemeinschaft og Gesellschaft. Hetta kunnu vit eisini velja at kalla Smásamfelagið og Stórsamfelagið.

Smásamfelagið (Gemeinschaft) er t.d. bygdin, t.v.s. parturin av samfelagnum, har fólk eru saman á ein beinleiðis hátt. Fólk samskifta fyrst og fremst við at tosa við hvønn annan, og atburður verður ikki stýrdur av lógum og reglum, men av normum og virðum. Smásamfelagið verður eisini mangan rópt ”lokalsamfelagið”.

Stórsamfelagið (Gesellschaft) er tað, vit vanliga bara rópa ”samfelagið”. Her er talan ikki um at menniskju eru saman, men at tey hava nakað til felags. Í stórsamfelagnum eru fólk ikki saman sum so, men tey hava tó nøkur ting til felags sum t.d. mál, mentan og normar. Samskiftið í stórsamfelagnum er formelt og gongur mangan gjøgnum fjølmiðlarnar.

Møguliga er tað júst hetta, ið er framtíðin hjá bygdini. Møguliga er tað ein misskiljing at halda, at bygdin eigur at býargerast fyri at kunna gerast ein partur av modernaða samfelagnum. Mangt bendir á, at tað ikki eru beinu vegirnir og fýrkantaðu grundstykkini, ið skulu bera bygdina fram, men heldur ting sum tað vakra útsýnið, tað hugnaliga umhvørvið og tey næru sosialu sambondini. Føroyski rithøvundurin Oddvør Johansen (2005) hevur m.a. orðað hetta soleiðis: *”Føroyingar hava higartil hugsað ógvuliga traditionelt, hvat ið húsabygging viðvíkur. Í dag búgva nógv fólk á stórplássum í egnum húsum. Í bróstinum á teimum bylgist ein gamal dreymur um tað eydnuríka einfalda lívið á bygd. Hetta ger, at flestu sethúsabýlingar hava ein stóran høvuðsveg inn í økið við fleiri smáum síðuvegum, ofta stongdum, so at friður skal valda í kvarterinum (sum á bygd).”*

Soleiðis hava sjálvt fólk á stórplássum tikið bygdalívstílin við sær. Og umvent eru bygdirnar vorðnar ein partur av netverksbýnum. Í Føroyum ár 2006 kann tað væl loysa seg at búgva á bygd, eisini hóast ein starvast í t.d. Tórshavn. Fyri tað fyrsta eru bæði húsa- og grundstykkjaprísirnir lægri á bygd enn í býunum, og fyri tað næsta eru bensinprísirnir enn í dag rættiliga lágir, eins og pendlarar eisini fáa partvíst ferðaendurgjald frá Toll & Skattstovu Føroya. Um vit t.d. ímynda okkum, at bensinprísirnir fara at hækka eisini í framtíðini, er tað klárt, at pendlingin gerst ein størri partur av húsarhaldsbúskapinum. Í fyrstu syftu kann hetta loysast við at varðveita ferðaendurgjaldið og harvið at flyta øktu útreiðslurnar frá tí einstaka yvir á tað almenna, men tað er undir øllum umstøðum ein politiskur spurningur.

Tað er somuleiðis ein politiskur spurningur, um man vil varðveita teir lágu grundstykkjaprísirnar úti á bygd, har nógvar kommunur í dag velja at selja grundstykkini til hálvan prís og minni í mun til, hvat tað kostar at framleiða grundstykkið. Hetta nemur aftur við ein annan viðkvæman spurning, nevniliga kommunusamanleggingarspurningin. Fara stóru, samanløgdu kommunurnar í framtíðini at seta ymiskar prísir á grundstykkini í teimum ymisku bygdunum? Kunnu stóru kommunurnar liva við, at nøkur grundstykki verða seld fyri minni enn tað, tey kosta at framleiða, meðan onnur verða seld til marknaðarprís? Hvi so ikki útstykkja har sum fólk eru til reiðar at gjalda veruliga prísin fyri grundstykkini? Fara kommunurnar yvirhøvur at hava orku at bjóða fólki bílig grundstykki í framtíðini, ella fer miðspjaðingin av almennu tænastunum (um miðspjaðingin væl at merkja verður gjøgnumførd) at noyða kommunurnar at nýta peningin til annað enn bílig grundstykki? Hetta eru alt spurningar um politiskan vilja; um man sær eitt virði í, at fólk framhaldandi fara at búseta seg á bygd heldur enn at búseta seg í býunum. Hetta er m.a. eisini ein spurningur um, hvussu stórt vald tær sokallaðu staðbundnu nevndirnar í teimum fyrrverandi bygdarkommununum fáa. Staðbundnar nevndir eru nevndir valdar av fólkinum í smáu bygdunum í stórum kommunum, millum annað í Tórshavnar, Klaksvíkar, Sørvágs og Fuglafjarðar kommunum. Tað stendur fast, at hesar nevndir í dag einans eru ráðgevandi, og tískil er tað ein spurningur um politiskan vilja og dugnaskap, hvørt stóru kommunurnar eisini í framtíðini koma at geva sær far um smærru bygdirnar.

Afturat hesum kemur, at vit saktans kunnu ímynda okkum, at føroyski bústaðarmarknaðurin fer at broytast nógv hesi komandi árini. Sitandi landsstýri hevur kunngjørt nakrar avgerandi broytingar í bústaðarlóggávuni, savnaðar í tí sonevnda Bústaðarpakkanum (t.d. Gaard 2005). Hesar broytingar kunnu føra við sær, at vit fara at síggja ein veruligan íbúðarmarknað í Føroyum, ið fer at gera tað gjørligt hjá teimum, ið ynskja tað, at flyta til býirnar, heldur enn at búseta seg í onkrari bygd á meginlandinum, har prísirnir í løtuni eru nógv lægri.

Í nøkrum økjum, serliga á útoyggjum, men eisini á meginlandinum, eru bygdir, ið ikki einans eru sovibygdir, men enntá eru vorðnar meiri at kalla vikuskiftis- ella summarfrítíðarbygdir. Góð dømir um slíkar bygdir eru Elduvík og Gásadalur, har sera fá fastbúgvandi eru eftir, meðan fólk, ið eru ættað haðani, og fremmandafólk hava keypt sær frítíðarhús í bygdini. Á útoyggjunum, t.d. í Mykinesi, eiga uttanbíggjamenn ein stóran part av jørðini og eru ein partur av bygdafelagsskapinum í frítíðarhøpi nakrar ferðir um árið, tá fjøllini og bjørgini skulu gangast. Møguliga fara vit at síggja meiri til hetta rákið í framtíðini, men undir øllum umstøðum tykist greitt, at bygdirnar ei longur kunnu síggjast sum lokal "framleiðsuregimir", men fáa sera ymiskar leiklutir alt eftir, um tær liggja nært ella fjart miðstaðarøkinum, um tær hava gott útsýni ella ei ella um politisku og sosialu strukturarnir eru til menning á staðnum, ella um bygdirnar meiri at kalla eru eitt samanrensl av meiri ella minni tilvildarligum familjum og persónum.

# Bókmentalisti


- **Andreassen 1992** – Eyðun Andreassen – *Folkelig Offentlighed* – Museum Tusculanums Forlag, København/Tórshavn, 1992
- **Brandt 1983a** – Jesper Brandt – *Træk i Færøernes middelaldergeografi* – í Geografisk Orientering, 1. 1983, 13.årgang
- **Brandt 1983b** – Jesper Brandt – *Det færøske bygdesamfund* – í Geografisk Orientering, 1. 1983, 13.årgang
- **Castells 1996** – Manuel Castells – *The Rise of the Network Society* – Blackwell Publishers, 1996
- **Finnsson 2005** – Bergmann Finnsson – *Samling og splittelse – en historisk empirisk analyse af samfundsudviklingen bag kommuneopdelingerne på Færøerne i perioden 1872-1967* – Integreret speciale i Historie og Geografi, Roskilde Universitetscenter 2005 (óútgivið)
- **Gaard 2005** – Heini Gaard – *Landsstýrið gjørt semju um almennan bústaðarpolitikk* – Dimmalætting, 8.juli 2005
- **Guttesen 1969** – Rolf Guttesen – *Færøernes interne og externe migrationer 1956-1965 – Med kort beskrivelse af samfunds- og befolkningsudviklingen* – Afløsningsopgave i befolkningsgeografi, Københavns Universitet, 1969 (óútgivið)
- **Holm & Mortensen 2004** – Dennis Holm og Bjarni Mortensen – *Kommunusamanlegging – hvat siga suðringar?* – Granskingardepilin fyri økismenning, 2004
- **Jóansson 1975** – Tórður Jóansson – *Saman tí standið – Fimti ára minningarrit Føroya Arbeiðarafelags* – Føroya Arbeiðarafelag, 1975
- **Joensen 1987** – Jóan Pauli Joensen – *Fra bonde til fisker – studier i overgangen fra bondesamfund til fiskersamfund på Færøerne* – Føroya fornminnisavn, Tórshavn, 1997
- **Johansen 1997** – Sámal Tróndur Johansen – *Fra 'hose til fiskefilet'* – et studie i Færøernes teknoøkonomiske historie – Arbejdspapir nr. 131, Publikationer fra Institut for geografi og internationale udviklingsstudier, RUC, 1997
- **Johansen 2005** – Oddvør Johansen – *Húsini skulu sita í brekkuni* – í Skáa í Dimmalætting 26.mai 2005

- **Justinussen 1999** – Jens Chr. Justinussen- *Fanget i fisken?*; en analyse af den politiske økonomi på Færøerne i efterkrigstiden- Institut for miljø, teknologi og samfund, Roskilde Universitetscenter, 1999
- **Løgtingslóg nr 87 frá 17.05.2000** um kommunustýri (kommunustýrislógin)
- **Kommununevndin 1997-8** – *Nýggj kommunal skipan, táttur 1 og 2* – Kommununevndin 1997-1998
- **Lemberg 1962** – Kai Lemberg – *Landsplanlægning på Færøerne* – í tíðarritinum ”Byplan”, árg. 14 - 1962
- **Madsen 1990** – Heini Madsen - *Færøerne i 1000 år* – Forlaget Skúvanes, Vadum, 1990
- **Madsen 1995** – Heini Madsen – *Fólkateljingin í Føroyum 1850* – Forlagið Skúvadal, 1995
- **Madsen 1999** – Heini Madsen – *Fólkateljingin í Føroyum 1801* – Forlagið Skúvadal, 1999
- **Matras Kristiansen 2005** – Sámal Matras Kristiansen – *Forestillingen om bostedet* – Integreret speciale i Socialvidenskab og Geografi, Roskilde Universitetscenter, 2005
- **Mitens 1953** – Edward Mitens – *Føroyskt lógsavn 1687-1953* – Mentunargrunnur Føroya løgtings, Tórshavn, 1953
- **Nielung 1968** – Ole Nielung – *Bygdetyper på Færøerne* – í tíðarritinum ”Kulturgeografi”, árg. 20, 1968